## Í dag er Jóansøka

Sjálvt um Jóansøkan varð hildin seinasta vikuskifti, er tað í dag, dagurin eitur Jóansøka. Minningardagurin hjá halgimennum var vanliga deyðadagur teirra, men hjá Johannes Doyparanum er tað føðingardagurin, ið verður hildin, av tí at hann var heilagur longu í móðurlívi.



# Havnin skal gerast altjóða metropolur

**Ein stórsligin verkætlan í milliardaklassanum skal broyta havnarlagið í Havn frá einum bingjuplássi við skrambli til eitt attraktivt øki, har fólk kunnu búgva og arbeiða sum vit kenna tað úr grannalondunum. Ætlanin fevnir eitt nú um vinnu- og íbúðarøki á havnalagnum í Havn**





*Jógvan Hugo Hansen og Jónsvein Joensen hava seinastu tvey árini arbeitt við einari stórari verkætlan, sum varð løgd fram í Miðlahúsinum í dag*

Mynd: Jens Kristian Vang

BYGGIVERKÆTLAN

*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*

Enn ein stór byggiverkætlan í Havn varð í dag løgd fram fyri almenningin. Tað eru teir báðir Jónsvein Joensen og Jógvan Hugo Hansen, ið standa aftanfyri verkætlanina, sum hevur verið í umbúna seinastu tvey árini.

Verkætlanin er í veruleikanum ein heildarætlan fyri miðbýin í Havn. Hon inniber, at byggja úteftir havnalagnum frá Bursatanga og heilt út á Skansabryggjuna. Talan er í stuttum um 350 íbúðir, 2200 skrivstovupláss, 12000 fermetrar til handlar, hotell við 250 kømunum, konsert- og ráðstevnuhølir við plássi til 4000 fólk og 2100 parkeringsbásar.

Hetta er fyrsta stigið til eina heildarætlan fyri innara miðbýin millum Skansan, Viðarlundina og Sandágerð.

### Umsókn latin

P/F Havnar Bryggja, ið partafelagið handan ætlanina eitur, hevur í dag latið eina umsókn um byggiloyvi inn til Tórshavnar Kommunu.

Vit hava arbeitt við hesari ætlanini í tvey ár, og nú